# Postflutningurin gongur væl

**Tað hevur gingið eftir ætlan at avgreiða jólapostin. Ongir trupulleikar hava staðist av nøkrum seinkingum, og alt, sum ætlað er at komið, er komið fram, sigur postverksstjórin**

POSTFLUTNINGUR
*Edvard Joensen*


*Postflutningurin gongur eftir ætlan um jólini. Eingin postur liggur og bíðar eftir at verða fluttur millum lond undan jólum, sigur stjórin á Postverki Føroya.*

Atlantsflog hevur spent seg út og fingið allan jólapostin fluttan til og av landinum til tíðina, sigur Bergur i Garði, stjóri á Postverki Føroya.

Hann sigur, at tað framvegis er soleiðis, at partar av pakkapostinum eru ein dag longri ávegis, enn ynskiligt hevði verið, men at eingir nevniverdugir trupulleikar annars hava verið við postflutninginum.

Bergur í Garði dylur ikki fyri, at hann hevur verið eitt sindur atfinningarsamur onkuntíð, tá talan hvur verið um postflutningin, síðan Atlantsflog fór at flyta postin millum lond. Men hann leggur dent á, at Atlantsflog tykist rættiliga hava tikið í nakkan á sær sjálvum og klárað uppgávuna, felagið hevur átikið sær, til fulnar.

Postflutningurin plagdi at vera ógvusligur um jóltíðir, um roknað verður í mun til aðrar tíðir á árinum. Men tað er ikki heilt soleiðis meira, sigur postverksstjórin.

– Fyrr kom jólaposturin í eini stórari rúgvu stutt undan jólum. Men nú tykist tað, sum hetta verður spjatt yvir longri tíðarskeið, umframt at umstøðurnar sum heild eru vorðnar nógv betri. Bæði til flutning millum lond og eisini innanlands, sigur Bergur í Garði.

Postinum er lógartryggjaður flutningsrættur, so hann hevur líkasum ein frammíhjárætt, sigur hann. Øðrvísi er við farmaflutningi, sum Postverkið eisini hevur nakað av.

– Har hevur tað verið onkur smávegis trupulleiki seinnu tíðina, har vit hava bíðað eftir farmi, sum hevur ligið eftir, sigur Bergur í Garði. Gjørt er vart við tað á rætt stað, og nú tykist, sum at hetta eisini er í lagi, sigur hann.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi, sum hevur postflutningin millum Føroyar og útheimin um hendur, váttar, at onkur smávegis trupulleiki hevur verið við onkrari prioriteringssending, sum ikki er komin við tann túrin, biðið hevur verið um. Onkur farmapakki hevur ligið nakrar túrar. Og tað harmast stjórin um.

Men alt í alt gongur tað, sum tað skal. Eisini við ferðafólkaflutninginum. Møguleikarnir at koma aftur og fram eru eisini batnaðir, so hvørt sum flogfør leggjast afturat hjá felagnum, sigur Magni Arge.

Hann ásannar, at øll, sum biða um ferðaseðil Atlantsflogi, sleppa ikki við júst tann dagin, tey ynskja. Men tey sleppa við kortini. Eitt sindur av trýstinum hevur danska felagið DAT tikið, sigur hann, men ikki so at tað ger nakran stórvegis mun hjá Atlantsflogi kortini, sigur Magni Arge.

## Nýggja samferðsluhavnin í Suðuroy tikin í nýtslu

**Tollaksmessudag verður nýggja samfersðluhavnin í Suðuroy tikin í nýtslu.Tað hendir á hátíðarhaldi á samferðsluhavnini hósdagin klokkan 12.30**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal nýggja nýggja samferðsluhavnin á Trongisvágsfirði takast í nýtslu.

Tað verður hósdagin, tollaksmessudag at havnin verður tikin í nýtslu.

Á miðdegi hósdagin kemur Smyril suður av Havnini og klokkan kl 12.30 verður nýggja samferðsluhavnin á Trongisvágsfirði alment tikin í nýtslu og tí sambandi verður alment hátíðarhald við røðum og har Tvøroyrar hornorkestur fer at spæla.

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, bjóðar vælkomin og letur Strandfaraskipum Landsins samferðsluhavnina til nýtslu. Kristian Davidsen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, fer eisini at siga nøkur orð og síðani fær Jóannes Eidesgaard, løgmaður, orðið og tað verður eisini hann, sum fær heiðurin at at klippa snórin og sostatt at taka samferðsluhavnina alment í nýtslu.

Eftir hetta bjóðar Landsverk til móttøku umborð á Smyrli.


*Her liggur Smyril við bryggju í nýggju samfersðluhavn-ina í Trongsvági. Hòsdagin verður havnin alment tikin í nýtslu*

*Myndina tók Leivur Nygaard*


merko JÓLAKALENDARIN

Mikudagur 22. desember 2004

NAKKASTEIKIR
fyri kg.

29,95

ESTRELLA
Taffel chips
275 gr.


14,95

SUPER
Blomkálsblanding
1 kilo
12,95



SPURNINGUR
Hvør eigur orðini til jólasálmin: Gleðilig jól ?

Tilboðið er bert galdandi mikudagin 22. desember 2004

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald.
Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum



SVAR

NAVN & TELEFON NUMMAR